

Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu

# Bioanalytikari

Vegna barnsburðarfarloyvi søkir Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu eftir einum bioanalytikara at byrja 1. februar 2009 fram til 1. februar 2010. Full arbeiðsvika, men møguleiki er fyri niðursettari tíð.

**Førleikakrøv**
- bioanalytikaraútbúgving
- teldukunnleika

Við tað, at deildin hevur fleiri granskingarverkætlanir í gongd í senn, er ynskiligt, at umsøkjarin er fleksibul, soleiðis at hann kann laga seg til tær ymisku granskingarætlanirnar.

Deildin hevur, síðan hon varð sett á stovn í 1988, skipað fyri ymiskum granskingarvirksemi innan bæði arbeiðslæknafrøði og fólkaheilsu. Hetta virksemi, sum hevur verið í neyvum samstarvi við starvsfelagar í Evropa, USA og Asia, er fíggjað við peningi frá almennum og privatum grunnum í Føroyum, USA, ES og Danmark. Ein megintáttur í granskingini er, hvussu dálkingin av heimshøvunum ávirkar heilsuna hjá føroyskum børnum - og nú eisini hjá vaksnum fólki. Á deildini starvast í løtuni 15 fólk.

Lønar- og setanartreytir samb. sáttmála millum Bioanalytikarafelagið og Fíggjarmálaráðið.

Umsóknarfreistin er fríggjadagin 19. desember kl. 12.00.

Nærri fæst at vita við at ringja á tlf. nr. 316696 ella 216696 til Pál Weihe, yvirlækna, ella t-post pal@health.fo.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og øðrum upplýsingum skal sendast til:

**Deildina fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu**
**Sjúkrahúsverk Føroya, Sigmundargøtu 5**
**Postsmogu 14 · FO-110 Tórshavn**
**Tfl.: 316696 · T-postur: dfaa@health.fo**

Vágs Kommuna

# Steðgi forboð

Hervið verður lýst, at frá Mikudegnum, 15 des kl. 08:00 verður steðgi forboð:

Frá Vágsvegi nr. 11 (Halgeir Skaalum) og út til vegamótið “Marknoyarvegur/Toftavegur”.

Lesið Sosialin -so eru tit við!

FUGLAFJARÐAR BÝRÁÐ

# PEDAGOGAR

## TIL DAGSTOVNIN OG STOVNAR HJÁ FUGLAFJARÐAR KOMMUNU

**Søkt verður eftir pedagogum til vøggustovu, barnagarðstovu og stovnar hjá Fuglafjarðar kommunu.**

**Byrjað verður 1. januar 2009 ella eftir nærri avtalu.**

- Eitt pedagogstarv á 30 t. viku í barnagarðsstovu
- Eitt pedagogstarv á 40 t. viku í barnagarðsstovu
- Eitt pedagogstarv á 40 t. viku í vøggustovu
- Eitt pedagogstarv á 35 t. viku at arbeiða við sertørvi í stovnum hjá Fuglafjarðar kommunu

Dagstovnurin er skipaður í tvey hús við eini barnagarðstovu eini vøggustovu í hvørjum húsi.

Frá 01.08.2006 er dagstovnurin ætlaður 76 børnum við tað at stovnurin varð víðkaður við eini barnagarðsstovu.

Vit sóknast eftir pedagogum og hjálparfólkum:

- ið kunna arbeiða sjálvstøðugt, og er førir fyri at orða seg skrivliga
- hevur arbeiðsroyndir, sum kunnu nýtast í dagliga arbeiðinum
- hevur umsorgan fyri børnunum
- er eldhugaður og jaligur
- hevur góð samstarvsevnir
- sær møguleikar fram um mørk

**Vit kunnu bjóða tær:**
- fjølbroyttar arbeiðsuppgávur
- eitt starv, har tú kanst brúka tínar dygdir, hava ávirkan og samstundis menna teg sjálvan
- samstarv við NSR tænastu, náms- og sálarfrøðilig ráðgeving, sosialu deild og stovnar hjá Fuglafjarðar kommunu

**Setanartreytir**
Løn eftir sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Kommunala arbeiðsgevarafelagið.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til leiðaran í dagstovninum Juliannu Næs á tlf 737780.

Umsóknir saman við avritum av prógvum og viðmælum skulu verða Býráðskrivstovuni, Norður í Gerði 10b, 530 Fuglafjørður í hendi í seinasta lagi 16. desember 2008.

Møguligar setanarsamrøður verða í viku 51.

Kommunan skilir sær rætt til at velja millum innkomnu umsóknir ella onga at taka.

# KEYP DUNNUR OG GÆS

**Dunnur uml. 2-3 kg. Gæs uml. 5-6 kg.**

**AVMARKAÐ NØGD.**



**ØYVIND LÜTZEN**
**Tel. 311782 / 211782**



ADVOKATSKRIVSTOVAN
Halgir Winther Poulsen, adv.
Fríða Patursson, adv.
Óla Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Jógvan E. Winther Poulsen, adv.
Aksel V. Johannesen, adv.
Eyðbjørn Larsen, adv. ft.

## Advokatskrivari og lærlingur

Søkt verður eftir advokatskrivara ella fólki við skrivstovuútbúgving.

Dentur verður lagdur á góð samstarvsevni og hollan kunnleika til føroyskt og danskt mál í skrift og talu. Kunnleiki til enskt er ein fyrimunur.

Eisini verður søkt eftir lærlingi til skrivstovu okkara.

Bæði størvini verða at seta frá 1. januar 2009 ella skjótast til ber.

Umsóknir við avritum av prógvum og ummælum skulu sendast undirritaðu í seinasta lagi 15. desember 2008.

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til Fríðu Patursson, advokat, tlf. 35 33 35 ella teldupost frp@jura.fo

Frúutrøð 4 · Postboks 6 · FO-110 Tórshavn
Tel 35 33 35 · Fax: 35 33 36 · www.jura.fo

**Føroya Skipara- og navigatørfelag**
**Yviri við Strond 3 · FO-100 Tórshavn**
**Tlf. 316973 · Fax 318516 · fsn@post.olivant.fo**

# Aðalfundur

Aðalfundur verður í Norðurlandahúsinum, týsdagin tann 30. desember 2008 kl.11.00 við hesi dagsskrá:

1. Val av fundarstjóra
2. Frágreiðing formansins um virki felagsins í farna ári
3. Framløga og støðutakan til roknskapin
4. Val av nevndarlimum
5. Val av grannskoðara og tiltaksmanni
6. Ásetan av limagjaldi og lógarbroyting
7. Ymiskt

**Føroya Skipara- og navigatørfelag**

# Læknaval

Teir limir, ið ynskja at skifta lækna frá 1. januar 2009, skulu siga frá nú ella í seinasta lagi 19. des. 2008.

NES SÓKNAR SJÚKRAKASSI · 24. FEBRUAR 1914

**NES SÓKNAR SJÚKRAKASSI**
FO-620 Runavík · Tæf- 448129